

Hiddenfjord

# Í samljóði við náttúruna

ESG FRÁGREIÐING 2025


**Vit halda okkum hava eina ábyrgd** at gera tað, sum vit kunnu, fyri at minka um okkara $CO_2$-útlát



# Innihald

## Hví eina frágreiðing um burðardygd? 6

## Um Hiddenfjord 8

Søgan um Hiddenfjord 10
Grundhugsjón 12
Marknaðarstøða 14
Góðska 18
Føðsluvirði 20

## Varandi aling 22

Laksalúsin er ein felags trupulleiki 24
Nýskapandi átøk 26
Stutt tíð í sjónum 26
Framleiðsla av hágóðskusmoltum 26
Stór smolt 28
Góður vøkstur 30
Natúrligur lúsaátari 32
Aling á ábærum økjum 34
Streymverja 36

## Sosial viðurskifti 38

Starvsfólkaviðurskifti 40
Rudda Føroyar 42
Alilærlingaútbúgving 43
Starvsfólkabussar 44

## Átøk fyri at minka um $CO_2$-útlátið 46

Úrslit av átøkum 47
$CO_2$-útlát frá flutningi 48
$CO_2$-útlát frá framleiðslu 50
Útgreinað $CO_2$-útlát 52
Fóður 53
Elektrifisering 54
Sól- og vindorka 56
Betri skiljing av burturkasti 58
Burðardyggur pakningur 60
$CO_2$-útrokningar 62
Mál fyri $CO_2$ 64

## Fiskaheilsa og fiskavælferð 66

Laksurin hevur gott pláss í ringunum 68
Lívfrøðilig lyklatøl 2022-2025 69

## Lívfrøðiligt margfeldi 70

Fóður 70
Vatn 70
Botnur 72
Djóralív runt um okkara virksemi 72
Nýtsla av evnavørum 73

# Hví eina frágreiðing um burðardygd?

Hiddenfjord er ein føroysk familjufyritøka, sum alir laks í samljóði við náttúruna.

Burðardygd hevur altíð verið okkara fremsta raðfesting, síðani vit byrjaðu at ala laks fyrst í áttatiárunum. Vøkstur kemur í aðru røð. Okkara virksemi skal vera skipað soleiðis, at vit tryggja varandi aling á teimum alifirðum, vit virka á, og gera okkara til at tryggja varandi aling í Føroyum.

Tað er eisini okkara ábyrgd, at vit seta okkum stór krøv í at hava góða djóravælferð, og at vit gera alt, vit eru ment, at tryggja, at okkara virksemi ikki elvir til óneyðuga dálking ella útlát. Hvørki her í Føroyum ella úti í heimi.

Endamálið við hesi frágreiðing um burðardygd er at veita eina lýsing av, hvussu Hiddenfjord arbeiðir við umhvørvi, samfelagsábyrgd og leiðslu (ESG), soleiðis at vit tryggja, at bæði okkara aling og okkara virksemi sum heild skal vera varandi og í samljóði við náttúruna. Hetta er onnur frágreiðing um burðardygd hjá Hiddenfjord, og frágreiðingin tekur útgangsstøði í VSME (B) standardinum.

Við frágreiðingini vilja vit vísa á, hvat vit í Hiddenfjord ítøkiliga gera og ætla at gera fyri at minka um okkara ávirkan á umhvørvið. Hetta vilja vit gera á ein hátt, sum er greiður, erligur og er bindandi fyri okkum. Við frágreiðingini vilja vit eisini vísa á, hvat vit halda, myndugleikar kunnu gera fyri at tryggja, at vit fáa so burðardygga alivinnu í Føroyum sum gjørligt. Okkara eftirkomarar skulu hava líka góðar ella betri treytir at liva í og saman við náttúruni, sum vit hava í dag.

Álit og opinleiki eru hornasteinar hjá okkum. Vit meina, at umhvørvismenning er treytað av opinleika, og at vinnan skal viðurkenna sínar avbjóðingar, so tær kunnu loysast. Tí halda vit okkum hava ábyrgd av at vísa á, hvørja ávirkan vit hava á umhvørvið.



Atli Gregersen, stjóri

# Um Hiddenfjord

**P/F Luna**
Á Fútakletti
360 Sandavágur
Faroe Islands

NACE vinnuflokking: A3.2.1 Marine Aquaculture, A3.2.2 Freshwater aquaculture
Adressur og koordinatar:

| | Bústaður | Koordinatar |
|---|---|---|
| **Skrivstova** | Við Ánna, 512 Norðragøta, Føroyar | 62° 11′59′′ N<br>06° 44′31′′ W |
| **Smoltstøð** | Á Fútakletti, 360 Sandavágur, Føroyar | 62° 05′55′′ N<br>07° 08′14′′ W |
| **Kryvjivirkið** | Bryggjan 11, 380 Sørvágur, Føroyar | 62° 04.6968′ N<br>07° 21.6175′ W |
| **Landstøð Sørvágur** | Bakkavegur 11, 380 Sørvágur, Føroyar | 62° 04.6968′ N<br>07° 21.6175′ W |
| **Landstøð Miðvágur** | Innara Bryggja 10, 370 Miðvágur, Føroyar | 62° 02.8625′ N<br>07° 09.4598′ W |
| **Landstøð Suðuri í Bug** | Oyrargjógv, 360 Sandavágur, Føroyar | 62° 06.0913′ N<br>07° 07.5784′ W |
| **Landstøð Velbastaður** | Gamlarætt 2, 176 Velbastaður, Føroyar | 61° 58.3724′ N<br>06° 50.1876′ W |
| **Landstøð Vestmanna** | Nesvegur 11, 358 Válur, Føroyar | 62° 08.167131′ N<br>07° 07.5784′ W |
| **Sølutoymið í Danmark** | Nordsøen Forskerpark<br>Willemoesvej 2<br>9850 Hirtshals | 57° 35.188′N<br>09° 58.798′E |
| **Sølutoymið í USA** | 68 Commercial Street<br>Building C – Floor 2<br>Portland, ME 04101 | 43° 39.414′N<br>70° 14.994′W |


Smoltstøð
Aling á sjónum
Góðskingarvirkið
Umsiting



Um Hiddenfjord

# Søgan um Hiddenfjord

Hiddenfjord er eitt 100% føroyskt alifelag. Brøðurnir Atli og Regin Gregersen eiga og reka fyritøkuna, sum alir laks. Í nevndini sita Regin Gregersen, Atli Gregersen, Jón Atlason og Barbara Annikudóttir Gregersen.

Hiddenfjord varð stovnað undir navninum p/f Fiskavirkið í 1929 í Syðrugøtu og framleiddi klippfisk. P/f Fiskavirkið varð rikið av Jóan Paula Gregersen, abba núverandi eigarar (í faðirætt) og stovnað saman við bygdarfólkinum við tí endamáli at útvega arbeiðspláss og livigrundarlag í bygdini.

Hiddenfjord hevur eisini røtur aftur til virksemið hjá S. P. Petersen í Fuglafirði, langabba núverandi eigarar (í móðurætt), ið varð sett á stovn í 1887. S. P. Petersen var ein framsøkin fyrtøka, ið legði dent á at framleiða dygdarvørur við vinningi fyri eyga.

Báðar hesar hugsjónir mynda Hiddenfjord í dag. Samstundis sum endamálið er at reka framsøkið vinnulív, stremba vit eftir at byggja land og vera við til at leggja gott lívsgrundarlag í Føroyum við at menna føroyska alivinnu. Sum familjufyritøka hava vit frælsi at virka hugsjónarliga og eftir egnari sannføring.

Hiddenfjord byrjaði sítt alivirksemi í 1982. Í dag hevur Hiddenfjord stórt virksemi í Føroyum. Smolt verða ald á smoltstøðini á Fútakletti og laksurin settur út á Sørvágsfjørð, á Miðvág, í Vestmanna, á Hestfjørð og Suðuri í Bug í Vestmannasundi. Allur laksur verður kruvdur og góðskaður á góðskingarvirkinum í Sørvági.

## Slóðbrótandi fyritøka

Hiddenfjord er ein sera nýskapandi fyritøka, sum hevur gingið undan við nógvum slóðbrótandi átøkum gjøgnum árini. Í Hiddenfjord er stutt frá starvsfólki til leiðslu. Ábyrgd verður býtt út, og starvsfólk verða hoyrd, tá ið avgerðir verða tiknar. Tí verða hugskot skjótt loftað, og tað er stutt frá tanka til gerð. Øll okkara starvsfólk eru á ymsan hátt við í at menna okkara virksemi. Tað hevur alstóran týdning at tryggja bæði ábyrgdarkenslu og nýhugsan hjá starvsfólkum og í felagnum sum heild, av tí at okkara starvsfólk hava sera stóran týdning í allari okkara menning og framgongd.

# Grundhugsjón

## Virðir

- **Burðardygd**
  Okkara virksemi skal vera í samljóði við náttúruna og hava so lítla ávirkan á umhvørvið sum gjørligt

- **Álit og opinleiki**
  Vit vilja vera sonn og álítandi, og okkara virksemi skal vera gjøgnumskygt

- **Nýhugsan**
  Vit virðismeta gransking og hava dirvi at bróta slóð við nýggjum loysnum fyri at menna okkara virksemi

- **Fíggjarligt varsemi**
  Alivinnan hevur stóran váða, og tí royna vit at ansa eftir, at vit hava peningaliga styrki til tær íløgur, vit gera, og til at tola mótgongd

## Mál

- **Vit vilja** gera okkara til, at aliøkið Føroyar verður gagnnýtt til fulnar

- **Vit vilja** minka um okkara $CO_2$-útlát

- **Vit vilja** framhaldandi framleiða heimsins besta laks

- **Vit vilja** tryggja góða djóravælferð

- **Vit vilja** vera eitt gott arbeiðspláss, har øll starvsfólk kenna seg vird





# Marknaðarstøða

## Sterk marknaðarstøða

Hiddenfjord verður í dag roknað sum eitt av heimsins fremstu og mest álítandi laksavørumerkjum. Við eini greiðari visjón um at framleiða laks í heimsflokki hevur Hiddenfjord seinastu árini gjørt fleiri átøk fyri at menna góðsku og haldføri enn meira. Hesi átøkini hava borið ávøkst, og hetta sæst aftur í støðugt vaksandi eftirspurningi frá kundum á altjóða marknaðum.

Síðani vit í 2020 tóku ta stóru avgerð at gevast við at nýta flogflutning, er okkara vørumerki styrkt munandi. Í dag hava vit sterka marknaðarstøðu í bæði USA og Evropa, har feskur laksur og fløk verða flutt sjóvegis og veitt okkara kundum hvørja viku.

Í dag eru á leið 10% av okkara vørum fryst laksafløk. Ein týðandi partur av okkara strategi er at flyta størri og størri part av frystum laksafløkum sjóvegis til marknaðir um allan heim.

## Samanhangandi tøka

Við einari samanhangandi og væl skipaðari tøku tryggja vit, at kundar okkara fáa Hiddenfjord laks hvørja viku.


Belgia
Grønland
Kýpros
Sveis
Holland
Føroyar
Rumenia
Suður Korea
Ísrael
Svøríki
Kekkia
Bretland
Vjetnam
Italia
Frakland
Týskland
Danmark
Kina
Spania
USA
Vekt (t)
0
1.000
2.000
3.000
4.000
5.000
6.000
7.000



Nøgd:

**17.630**

tons kruvd vekt (2025)



# Góðska

Laksurin hjá Hiddenfjord er kendur fyri sín frískleika, góða smakk og langa haldføri. Orsøkirnar eru millum annað aling á ábærum økjum, stórt fokus á góða djóravælferð og strongdarfrí tøka. Laksurin verður pakkaður minni enn tríggjar tímar eftir tøku, og vit hava tamarhald á køliketuni gjøgnum allan flutningin frá góðskingarvirkinum í Sørvági til endakundar í útlondum. Hetta tryggjar bæði støðuga vørugóðsku og langt haldføri.

## Strongdarfrí tøka

Tøkuhátturin hjá Hiddenfjord er sermerktur. Tá ið laksurin skal takast, verður hann varliga fluttur inn til bryggjukantin. Inni við bryggjukantin skal laksurin hvíla, áðrenn hann hóvliga svimur yvir í eitt tøkubúr. Hesin háttur tryggjar strongdarfría tøku, av tí at laksurin er úthvíldur, og tí bert ein lítil nøgd av laksi verður tikin í senn. Hiddenfjord er ein av fáum alifyritøkum, ið ikki nýta brunnbát til tøku. Okkara royndir og kanningar vísa, at hesin strongdarfrìi tøkuháttur hevur stóran týdning fyri bæði góðsku og haldføri á okkara vøru.

# Føðsluvirði

Hiddenfjord laksur er heilsugóður og inniheldur m.a. stórar nøgdir av omega-3 feittsýrum, proteini og vitaminum.

Á myndini sæst, hvussu dagligi tørvurin hjá einum vaksnum persóni verður nøktaður við 125 g av Hiddenfjord laksi, sambært tilvísingarvirðinum.



Vitamin D3
**164%**
5 µg [1)]

Selenium
**55%**
55 µg [1)]

EPA+DHA
**521%**
250 mg [2)]



*1) NRV: 1) NRV er føðsluvirði sambært ES fyriskipan nr. 1169/2011 frá Evropatinginum og Ráðnum tann 25. oktobur 2011 um ásetingar um brúkarakunning um matvøru.*

*2) AI: Hóskilig inntøka: Viðmælt daglig miðalkostinntøka: Yvirlitsfrágreiðing, 2019 Evropiski mattrygdarmyndugleikin (EFSA)*

# Varandi aling

Føroyar eru eitt sera vælegnað land at ala laks í, av tí at hóskandi javni sjóvarhitin millum 6 og 11 stig og góða vatngóðskan tryggja sera góðar umstøður hjá laksinum. Tó hava lúsa- og sjúkutrupulleikar víst seg at vera ein avbjóðing. Tí er tað avgerandi, at rætt verður farið fram fyri at tryggja varandi aling fyri okkum og okkara eftirkomarar. Tí mugu hóskandi strangar reglur tryggja, at alingin mennist á tryggum, burðardyggum grundarlagi.

## 2003-nýskipanin kollvelti føroysku alivinnuna

Vit byrjaðu okkara alivirksemi í 1982. Alingin var skipað soleiðis, at tað vóru fleiri alarar á hvørjum alifirði. Tað vóru eisini fleiri árgangir av laksi á hvørjum alifirði samstundis. Hetta gjørdi, at stórir lúsa- og sjúkutrupulleikar við tíðini stungu seg upp og breiddu seg millum árgangir og alifyritøkur á hvørjum firði, og fellið var stórt og versnandi. Tí var greitt, at skipanin ikki var burðardygg og mátti broytast, um alingini skuldi vera lív lagað.

Í 1998 tók Hiddenfjord stig til eina tilgongd, sum í 2003 eftir tógvið stríð hevði við sær eina nýggja rakstrarkunngerð fyri føroysku alivinnuna. Serliga týdningarmiklir partar av 2003-nýskipanini vóru tríggjar meginreglur:

1. Ein alari á hvørjum firði
2. Bert ein árgangur á hvørjum alifirði í senn
3. Økishvíld ímillum hvørt aliumfar

2003-nýskipanin er meginorsøkin til, at føroyska alivinnan í dag eigur stóran part av lívsgrundarlagnum í Føroyum. Føroyska alivinnan menti seg eftir 2003 til at verða heimsins besta, og hesar strongu reglur eru síðani nýttar sum íblástur til burðardygga alivinnu um allan heimin. Síðani nýskipanina er alingin í Føroyum vaksin nógv. 2003-nýskipanin minkaði serliga um sjúkur, sum ferðast stutt uttan vert, og hetta gjørdi, at trupulleikin við sjúkum mestsum hvarv. 2003-nýskipanin var tó ikki fullgóð móti lús, sum ferðast víða uttan vert.



## Laksalúsin er ein felags trupulleiki

Størsti trupulleikin hjá føroysku alivinnuni seinastu nógvu árini hevur verið laksalúsin, ið hevur elvt til nógvar viðgerðir, fleiri sjúkuútbrot og stórt felli. Nógv lús á einum alifirði elvir til stórt smittutrýst á hinum firðunum í Føroyum. Tí er laksalúsin ein eksternalitetur og sostatt ein felags trupulleiki hjá alivinnuni.

Stóra avbjóðingin við laksalúsini í føroysku alivinnuni hevur fingið okkum at gera eina rúgvu av átøkum og menning seinastu nógvu árini viðvíkjandi okkara fyribyrgjandi lúsastrategi. Vit hava lagt dent á at seta fólk við serkønari vitan í starv, eins og vit hava leitað eftir og luttikið í nýggjastu granskingini. Okkara áhaldandi átøk og menning hava flutt okkum langt fram á leið.

Komandi árini er væntandi, at laksaalingin í Føroyum fer at vaksa nógv. Um verandi lúsakunngerð ikki verður broytt, er sannlíkt, at samlaða lúsatalið eisini fer at vaksa, og so er vandi fyri, at laksalúsin fer at elva til uppaftur størri trupulleikar.

Tí hava vit í nógv ár stríðst fyri at fáa hóskandi stranga lúsakunngerð. Lúsakunngerðin er herd fleiri ferðir seinastu árini, og hetta sæst aftur á lúsatølunum. Av tí at lúsakunngerðin í dag áleggur eitt markvirði av lús pr. laks, er stórur vandi fyri, at samlaða talið á lús í Føroyum fer at vaksa við vaksandi laksatalinum á sjónum. Tí er alneyðugt, at lúsakunngerðin verður skipað soleiðis, at stýrt verður eftir samlaðum lúsatali heldur enn lús pr. laks.

Eins og í tilgongdini til at menna eina stranga nýskipan í 2003 liggur stór ábyrgd hjá myndugleikunum at menna lúsakunngerðina, soleiðis at vøkstur í alivinnuni kann fara fram á tryggum og burðardyggum grundarlagi til frama fyri alla føroyska aling.





# Nýskapandi átøk

Niðanfyri fara vit at lýsa fleiri av okkara størstu og best eydnaðu átøkum, sum hava havt við sær færri lýs, betri vøkstur, minni tørv á viðgerðum og minni felli.

Av tí at laksalúsin seinastu nógvu árini hevur verið størsta avbjóðingin í alivinnuni, hevur hon eisini verið drívmegin fyri sera stórum parti av okkara mennandi átøkum.

## Stutt tíð í sjónum

Tess styttri tíð laksurin er í sjónum, tess minni er lívfrøðiligi vandin við lús og sjúkum. Okkara størstu og mest slóðbrótandi átøk fyri at stytta tíðina í sjónum eru framleiðsla av stórum hágóðskusmoltum á landi og stórur dentur á góðan vøkstur, tá ið laksurin er í sjónum.

Hesin partur av okkara fyribyrgjandi strategi gevur eina jaliga ringrás, ið minkar um talið á lúsum, ið verður sent í umferð, og minkar um tørvin á viðgerðum.

## Framleiðsla av hágóðskusmoltum

Ein týðandi partur av grundarlagnum fyri at stytta tíðina á sjónum verður lagdur á okkara smoltstøð. Okkara dugnaligu starvsfólk hava miðvíst arbeitt við at menna framleiðsluna av smoltunum og góðskuna á teimum. Vit hava fylgt væl við í gransking og hava havt dirvi at gera royndir við nýggjum loysnum. Hetta sæst týðiliga aftur á trivnaðinum og vøkstrinum á sjónum.

Nógv ymisk átøk hava elvt til hesa framgongd. Eitt nú kann nevnast, at vit í Hiddenfjord áhaldandi hava leitað eftir rognum við teimum bestu arvafrøðiligu eginleikunum. Eisini snýr tað seg í sera stóran mun um at hava so góða vatngóðsku sum yvirhøvur gjørligt. Millum annað hava vit gjørt stór átøk fyri at halda hita og $CO_2$ í vatninum lágt fyri at tryggja, at laksurin gagnnýtir sínar vakstrarmøguleikar sum best, tá ið hann kemur á sjógv.

## Stór smolt
## – ein stór og vágamikil íløga

Í 2010 tók Hiddenfjord sum fyrsta alifelag í heiminum ta stóru avgerð at framleiða stór hágóðskusmolt. Útbyggingin av smoltstøðini á Fútakletti var ein stór og vágamikil íløga.

Avgerðin at framleiða stór smolt varð tikin fyri at minka um trupulleikarnar av lús, tí tess størri smoltini eru, tess styttri skal laksurin ganga í sjónum, og harvið verða sjálvsagt færri lýs og færri lívfrøðiligar avbjóðingar.

Menningin við aling av stórum smoltum hjá Hiddenfjord hevur kveikt stóran áhuga í vinnuni, og vit hava havt alarar úr øllum heiminum á vitjan at læra av okkara royndum. Í 2025 rukku vit málinum um at seta út stór smolt yvir 800 g í miðal.

# Smoltvekt


Hiddenfjord
Onnur Føroyar
Noreg
Skotland
Ísland
Kili
900
800
700
600
500
400
300
200
100
0
gramm
2010
2011
2012
2013
2014
2015
2016
2017
2018
2019
2020
2021
2022
2023
2024
2025



## Góður vøkstur

Tað hevur stóran týdning, at laksurin trívist væl og harvið kann gagnnýta sínar natúrligu vakstrarmøguleikar fyri at stytta um tíðina, laksurin er í sjónum. Hetta krevur dugnalig og nærløgd starvsfólk.

Munagóð fóðring hevur stóran týdning fyri at fáa laksin at vaksa væl. Fóðringin skal tryggja, at hvør einasti laksur etur seg mettan, umframt at so lítið av fóðri sum gjørligt fer til spillis.

Síðani aldarskiftið hava vit brúkt myndatól á øllum aliringum, so at vit altíð kunnu fylgja við átinum hjá laksinum frá fóðringstøð á landi. Í dag nýta vit myndatól undir vatnskorpuni í aliringunum til at eyðmerkja fóðurperlur og til at stýra fóðringini við. Skipanin, ið er so at siga hundrað prosent teldustýrd, tryggjar, at laksurin fær fóður, til hann er mettur, og at sera lítið av fóðri fer til spillis.

Ábæru aliøkini hjá Hiddenfjord við nógvari útskifting av sjógvi tryggja reint og gott umhvørvi hjá laksinum at vaksa í.

## Natúrligur lúsaátari

Rognkelsini eta lús og hjálpa okkum sera væl í stríðnum móti laksalúsini. Tí hava vit síðani 2014 arbeitt miðvíst við at nýta rognkelsi sum lúsatálmara í okkara fyribyrgjandi strategi móti laksalúsini.

At brúka rognkelsi til aling er lutfalsliga nýtt. Hóast rognkelsi sum lúsatálmari er munagóður máti at basa lús við, er fellið av rognkelsum framvegis ov stórt.

Hiddenfjord hevur verið virkin partur í gransking um rognkelsi og teirra trivnað, og í 2024 settu vit ein djóralækna í starv, sum burturav hevur ábyrgd av rognkelsum. Vit hava millum annað gingið á odda fyri at menna koppingarevni til tvey bakteriusløg og hetta hevur virkað væl.

Vit eru sannførd um, at uttan lúsaát frá rognkelsum var neyðugt við fleiri viðgerðum, ið hava við sær størri vanda fyri felli av laksi.







## Aling á ábærum økjum

Tað var eitt sera stórt stig at taka, tá ið Hiddenfjord byrjaði við aling á ábærum økjum longu í 1988, og síðani tá hevur Hiddenfjord hildið áfram við menningini av aling á ábærum økjum

Á ábærum aliøkjum hava vit stóra útskifting av sjógvi, har umstøðurnar hjá lúsunum at hópa seg upp eru truplari. Eisini tryggjar stóra útskiftið av sjógvi, at vatngóðskan í ringunum altíð er góð, og at botnurin undir ringunum er reinur.

Hiddenfjord hevur gingið á odda við harðbalnari aling, og vit tora við vissu at siga, at vit ala á ábærastu aliøkjum í heiminum.



## Streymverja
## – enn ein slóðbrótandi nýmenning

Í tøttum samstarvi við føroyska ráðgevingarfyritøku hava vit ment eina streymverju, ið ger tað møguligt at ala laks í hørðum ráki, sum annars var óhugsandi. Síðani 2021 hava vit gjørt fleiri mátingar, útrokningar og modelleringar fyri at finna fram til, hvussu vit kunnu minka rákið so mikið, at tað er møguligt at ala laks.

Úrslitið er ein slóðbrótandi loysn. Við dugnaligum starvsfólkum og serfrøði hava vit gjørt áhaldandi tillagingar, sum hava prógvað, at tað nú ber til at ala laks, har náttúran annars setti mørk.

Góða og støðuga útskiftingin av sjógvi er við til at tryggja sera góða vatngóðsku fyri laksin og reinan botn undir ringunum. Harafturat er rákið við til at tryggja, at lús ikki sleppur at hópa seg upp. Vit eru errin av at standa á odda fyri hesi menning, sum longu vekir ans bæði í Føroyum og uttanlands. Vit eru vís í, at henda tøkniliga nýhugsan fer at verða nýtt aðrastaðni sum frá líður.





# Sosial viðurskifti

Starvsfólkahópurin hjá Hiddenfjord er vaksin nógv seinastu fimm árini, og í 2025 arbeiddu 472 starvsfólk og vóru tilsamans 220 ársverk í felagnum.

Vit leggja stóran dent á at vera eitt gott arbeiðspláss, har øll starvsfólk kenna seg vird og verða viðfarin á virðiligan hátt, óansæð aldur, kyn, uppruna, mál, átrúnað, kynsliga sannføring, húðarlit, ella um tey bera brek. Í Hiddenfjord leggja vit dent á at skipa fyri regluligum starvsfólkatiltøkum, ið eru við til at knýta bond og skapa trivnað.

Okkara starvsfólk eru týðandi partur av okkara menning og framgongd, og tað hevur stóran týdning at tryggja bæði ábyrgdarkenslu og nýhugsan hjá starvfólkum og í felagnum sum heild. Tað er týdningarmikið, at øll starvsfólk fáa munagóða upplæring og vitan til at útinna sínar uppgávur á tryggan hátt. Vit royna at raðfesta førleikamenning, umframt at vit skipa fyri árligum innanhýsis skeiðum í fiskaheilsu og djóravælferð, reinføri, smittufyribyrging og trygd.

Í 2025 settu vit eina varskóskipan í verk, sum gevur starvsfólkum møguleika at boða frá áheitanum ella stúranum dulnevnt. Hetta er ein liður í okkara arbeiði við at skapa eina góða og opna mentan á arbeiðsplássinum. Vit fara eisini at seta okkum greið mál innan fyri starvsfólkaútskifting, sjúkrafráveru, tal á fólkum í vardum starvi, arbeiðsskaðar, sum verða í komandi frágreiðingum.



2025

# Starvsfólkaviðurskifti










Lønarmunur millum kyn




Sáttmálasett starvsfólk



# Tjóðskapir

Hjá Hiddenfjord arbeiða fólk
úr 22 ymiskum londum.





# Rudda Føroyar

Rudda Føroyar er ein felagsskapur, ið millum annað skipar fyri árligum ruddingardegi í Føroyum. Síðani 2018 hava yvir 1.000 føroyingar, bæði einstaklingar, stovnar og fyritøkur, luttikið í ruddingardegnum. Rudda Føroyar er partur av altjóða móðurverkætlanini Let's do it World!, sum á hvørjum ári hevur umleið 20 milliónir fólk úr øllum heiminum, sum rudda. Yvirskipaða endamálið við verkætlanini er at tryggja ein reinan, sunnan og ruskleysan heim.

Hiddenfjord hevur verið høvuðsstuðul hjá Rudda Føroyar á hvørjum ári síðani 2019. Umframt pengingaligan stuðul hava vit í Hiddenfjord saman við okkara starvsfólkum á hvørjum ári luttikið í ruddingardegum. Hetta er ein hugnaligur dagur, sum er við til at birta tilvitan og menna góðan hugburð. Við at stuðla átakinum Rudda Føroyar viðvirka vit til at varðveita náttúruna og at halda Føroyar reinar og vakrar.

# Alilærlingaútbúgving

## – framtíðin fyri burðardygga aling

Hiddenfjord hevur verið við til at stuðlað upp undir at seta eina fýra ára yrkisútbúgving í aling á stovn. Útbúgvingin, ið er ein samanrenning millum upplæring á læruplássi og undirvísing í skúla, er ein liður í at tryggja haldføra aling við at førleikamenna alinæmingar og sostatt lyfta vitanarstøðið í vinnuni. Útbúgvingin tryggjar, at næmingarnir læra grundleggjandi viðurskifti um eitt nú fiskaheilsu og fiskatrivnað, umframt at dentur er lagdur á burðardygd og djóravælferð í undirvísingini. Vit bjóða okkara starvsfólkum á smoltstøðini og í alingini á sjónum at taka hesa yrkisútbúgving og fegnast um, at fleiri hava tikið av hesum møguleikanum.



# Starvsfólkabussar

## – eitt burðardygt átak fyri starvsfólk og umhvørvi

Hiddenfjord hevur ognað sær tveir elbussar, ið starvsfólk hjá felagnum kunnu nýta fyri at koma til og frá arbeiði. Bussarnir koyra eftir arbeiðstíðunum hjá starvsfólkunum og tryggja, at tey sleppa til og frá arbeiði á ein burðardyggari, tryggan og ókeypis hátt. Ofta er illfýsi í Føroyum, og tí hava vit eftir besta førimuni lagt rutuna, har sum starvsfólk búgva.

Vit arbeiða áhaldandi fyri starvsfólkatrivnaði og vóna, at samkoyringin eisini kann viðvirka til hetta umframt at minka um bilaferðslu og hennara $CO_2$-útlát.





# Átøk fyri at minka um $CO_2$-útlátið

Tað er eyðsýnt, at veðurlagsbroytingar eru ein av teimum størstu avbjóðingunum, ið heimurin hevur í løtuni. Serfrøðingar hava í áravís rópað varskó, at vit mugu minka um $CO_2$-úlátið,* áðrenn tað er ov seint.

Vit í Hiddenfjord halda okkum hava eina ábyrgd at gera tað, sum vit kunnu, fyri at minka um okkara $CO_2$-útlát, og vit hava bæði hugsjónaligt og peningaligt frælsi til at gera átrokandi átøk her og nú.

Tí settu vit okkum fyri at minka um útlátið í øllum liðum í okkara virksemi. Vit avgjørdu at byrja við teimum átøkum, ið gera størstan mun.

Tølini, ið vit vísa á næstu síðu, eru roknað av ráðgevingarfyritøkuni Asplan Viak AS og triðjapartsgóðkend av Research Institute of Sweden (RISE) í Svøríki. Fyri at tryggja, at einstakar hendingar ikki hava ov stóra ávirkan á úrslitið, er rættast at nýta útlátið fyri eitt trý ára tíðarskeið (Product Environment Footprint (PEF) mannagongd).

*Tað finnast fleiri sløg av gassum, sum hava ymsa ávirkan. Fyri at hava eitt samlað mát fyri ávirkanina av øllum hesum gassum verður henda ávirkan umroknað til $CO_2$-ekvivalentar. $CO_2$-útlátið umboðar tí samlaða útlátið av øllum gassum.

---

**Á næstu síðunum ber til at lesa meira um okkara átøk at minka um $CO_2$-útlát.**

# Úrslit av átøkum




## Avriksmátingar

Grafurin vísir, at samlaða útlátið hevði verið 151.586 tons av $CO_2$, um eingi átøk vórðu sett í verk.

At gevast við flogflutningi hevur verið størsta burðardygdarátakið hjá okkum. Við at gevast við at flúgva til Asia og Amerika og í staðin flyta vøruna sjóvegis minkaði samlaða útlátið heili 48.860 tons (útrokningarnar taka støði í, at allur útflutningur til Asia og Amerika í 2025 fór við flogfari heldur enn við skipi).

Næststørsta átakið var at skifta til at nýta fóður við minni $CO_2$-útláti. Hetta minkaði okkara útlát heili 39.140 tons av $CO_2$.

Hiddenfjord hevur størstu sólpanellund í Føroyum. Burðardygdarátakið veitir el úr varandi orkukeldum, og hetta minkar útlátið 61 tons av $CO_2$.

Eitt fjórða átak fyri at minkað um okkara $CO_2$ var at flyta ein part av okkara fesku vørum í burðardyggum pakningi (pappeskjur heldur enn flamingokassar).

Samanlagt hava hesi átøk minkað okkara útlát úr 151.586 tons $CO_2$ í 2019 niður í 63.012 tons av $CO_2$ í 2025.

**Vit arbeiða áhaldandi við at minka um okkara $CO_2$-útlát. Millum møguligu átøkini eru at útbyggja elframleiðslu úr sólorku, framleiða el úr vindorku, minka um útlát frá starvsfólkaútflutningi og senda størri nøgdir av vøru í burðardyggum pakningi.**

# $CO_2$-útlát frá flutningi



Vit tóku eitt djarvt og framskygt stig í 2020: Vit gjørdust fyrsta alifelag í heiminum, sum heilt gavst við loftvegis flutningi av laksi. Við hesi avgerð hava vit megnað at minka um okkara útlát frá langvegis flutningi heili 94%. Í fimm ár hava vit við erpni og ábyrgd flutt okkara laks sjóvegis.

Stór nøgd av laksi verður í dag flogin til fjarmarknaðir. USA og Asia eru marknaðir, ið vilja gjalda lutfalsliga høgan prís fyri laks, og eftirspurningurin er størstur á teimum feskastu vørunum. Tí loysir tað seg peningaliga at flúgva til hesar marknaðir, men prísurin er høgur fyri umhvørvið.

Flyta vit laks til New York loftvegis, er $CO_2$-útlátið av flutninginum 7,1 kg fyri hvørt kilo av laksi. Um laksurin hinvegin verður fluttur sjóvegis, er $CO_2$-útlátið av flutninginum 0,35 kg fyri hvørt kilo av laksi. Tí spyrja vit: Er tað etiskt rætt at flyta matvørur loftvegis?

Vit eru sera errin av at hava hildið fast um hesa avgerð, hóast tað hevur við sær, at vit ikki kunnu røkka einum til tíðir høgt gjaldandi fjarmarknaði við feskari vøru. Ein stórur fyrimunur við okkara avgerð er, at vit hava fingið fult tamarhald á køliketuni, frá tí at fiskurin verður pakkaður, og til kundin fær vøruna. Støðuga køliketan hevur sera góða ávirkan á góðskuna og haldførið.

# $CO_2$-útlát frá framleiðslu



Vaksandi fólkatalið í heiminum økir um tørvin á mati. Tí má framleiðslan av heilsugóðum mati við lítlum $CO_2$-útláti økjast. Samanborið við aðrar framleiddar proteinríkar rávørur er laksur heilsugóður, hevur føðslugóð protein og er ein rávøra við lutfalsliga lítlum $CO_2$-útláti. Tí fer laksaaling væntandi at hava ein týðandi leiklut í at nøkta vaksandi tørvin á mati í heiminum.

Árini 2023–2025 var $CO_2$-útlátið frá okkara framleiðslu, við kryvjing og pakking, 3,4 kg av $CO_2$** fyri hvørt kilo av kruvdum laksi. Sostatt er okkara laksur ein sera góð rávøra við lutfalsliga lítlum útláti. Men verður laksurin flogin til marknaðin, verður $CO_2$-útlátið fleirfaldað.

Vit eru sera errin av, at okkara miðvísa arbeiði at minka um $CO_2$-útlátið gevur úrslit. Útlátið frá framleiðslu fyri tíðarskeiðið 2023–2025 er minkað heili 27% í mun til tíðarskeiðið 2020–2022.

Samanborið við miðalútlátið frá norsku alivinnuni*** er okkara útlát 31% lægri. Størsti partur av $CO_2$-útlátinum frá framleiðslu stavar frá fóðrinum.

**$CO_2$-útlátið er grundað á økonomiskt býti (economical allocation), sum merkir, at $CO_2$-útlátið verður býtt út á ymsu vørurnar, sum koma frá einum laksi (kruvdur laksur, flak, høvd og ryggir, avskurðir o.s.fr.) eftir søluvirði.

*** Kelda: fhf.no

# Útgreinað $CO_2$-útlát




## Útgreinað $CO_2$-útlát frá 1 kilo av kruvdum laksi eftir pakking

- 61,1% Fóður
- 21,6% El
- 6,5% Olja
- 6,1% Pakking
- 3,9% Bygningar og útgerð
- 0,7% Annað
- 0,1% Rognkelsi

# Fóður

Høvuðsorsøkin til okkara lítla $CO_2$-útlát frá framleiðslu er okkara skifti til eitt meira marint fóður við munandi minni $CO_2$-útláti, og at vit hava minni felli enn vinnan sum heild. Hetta merkir, at lutfalsliga stórur partur av fóðrinum og orkuni, ið vit nýta til okkara framleiðslu, verður til lidna vøru.

Lítla fellið saman við munagóðari fóðring ger, at vit í Hiddenfjord brúka lutfalsliga lítið av fóðri til at framleiða eitt kilo av laksi. Í árunum 2020–2022 brúktu vit 1,12 kg av fóðri til at framleiða eitt kilo av laksi (livandi vekt). Fyri tíðarskeiðið 2023–2025 er hetta talið 1,17 kg.





# Elektrifisering

El- og oljunýtslan standa fyri stórum partinum av $CO_2$-útlátinum hjá felagnum. Tí settu vit í 2022 orkuverkfrøðing í starv til burturav at vísa á loysnir og fremja átøk at minka um útlátið frá hesum keldum. Í dag eru allir okkara fóðurflakar riknir við landstreymi, eins og vit eru komin langt við at leggja okkara bilar og hitakeldur um til el-riknar skipanir. Vit vænta, at allir bilar eru 100% elriknir í 2028.

| Tal á bilum | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2028 |
|---|---|---|---|---|---|
| Elbilar | 6 | 14 | 17 | 18 | |
| Bilar tils. | 24 | 32 | 32 | 32 | |
| % elbilar | 25% | 43% | 53% | 56% | 100% |

Umleggingin er eisini í gongd, tá ið um ræður upphiting av bygningum. Her er talan um at skifta oljufýringar um við hitapumpur ella aðrar elriknar skipanir. Málið er, at í 2028 verður eingin olja nýtt til upphiting.

| Upphiting | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2028 |
|---|---|---|---|---|---|
| % elrikið | 50% | 58% | 75% | 75% | 100% |

Hesar umleggingar saman við útbyggingum av virkseminum hjá okkum, ið tørva nógva elorku, fara at økja munandi um okkara elnýtslu komandi árini.
Tí er tað neyðugt, at elframleiðslan verður so burðardygg sum gjørligt sum skjótast.

# Sól- og vindorka

Sólin er ein ótømandi kelda til orku, og tí kunnu vit gagnnýta orkuna, ið sólin gevur, til at framleiða streym til okkara virksemi á burðardyggan hátt. Ein fyrimunur við sólpanelum er, at tey hava sera lítla ávirkan á náttúruna, um tey verða løgd á verandi bygningar.

Fyrstu sólpanelini hjá Hiddenfjord vórðu tikin í nýtslu í 2022. Síðani tá hava vit lagt sólpanel á fleiri av okkara tekjum, og í dag hava vit á leið 75% av øllum sólpanelum í Føroyum.



Varandi aling

Vit hava síðani 2021 mátað vindlíkindini í haganum oman fyri smoltstøðina við tí fyri eyga at seta vindmyllur upp. Mátingarnar vísa, at hetta ber til, og tí arbeiða vit miðvíst við at seta vindmyllur upp í økinum. Tá ið politiskur vilji verður fyri hesum, fer tað at gerast møguligt at framleiða stóran part av okkara eltørvi úr varandi orkukeldum.





# Betri skiljing av burturkasti

Burturkastið hjá Hiddenfjord verður burturbeint í samsvari við galdandi føroyska lóggávu. Fyritøkan skilur burturkast í ymiskar bólkar, so sum plast, metal, papp og lívrunnið burturkast. Burturkast, sum ikki kann endurnýtast, verður annaðhvørt brent til orku ella tyrvt. Virksemið hjá Hiddenfjord, sum framleiðir burturkast, kann býtast í hesi øki: alingin, smoltstøðin, kryvivirkið og umsitingin.

Hiddenfjord hevur sett sum mál at arbeiða við at skilja ruskið uppaftur betur komandi árini. Málið er at minka brenningina av burturkasti og at økja um endurvinningina. Hetta verður gjørt við at raðfesta betri umstøður, mannagongdir og upplæring í at skilja burturkast.

Skiftið av pakningi minkar útlátið fyri framleiðslu av pakningi **65%**




# Burðardyggur pakningur

Tá ið vit tóku avgerð um at gevast við flogflutningni av okkara laksavørum, sá felagið ein gyltan møguleika at endurskoða, hvussu vøran verður pakkað. Við at flyta laksin sjóvegis heldur enn loftvegis hava vit megnað at tryggja munandi støðugari køliketu. Hetta hevur givið okkum enn betri fortreytir at skifta siðbundnu flamingokassarnar við eitt burðardyggari alternativ úr pappi.

Vit komu fram til eina papployn við væl lægri $CO_2$-útláti enn flamingokassin. Í dag fer ein partur av okkara fesku laksavørum til okkara kundar í einari burðardyggari eksju. Við hesum tekur Hiddenfjord enn eitt burðardygt stig innan fyri alivinnu og útflutning.




Tað kunnu leggjast 33 pappeskjur á ein platt, samanborið við einans 27 flamingokassar. Hetta merkir alsamt effektivari flutning, og at útlátið í sambandi við flutning samstundis minkar

35%

# $CO_2$-útrokningar

## Framleiðsla og $CO_2$-útlát 2019–2025




Minka $CO_2$ við átøkum

Frá 2019 til 2025 vaks framleiðslan hjá Hiddenfjord 43%, samstundis sum okkara **$CO_2$-útlát er minkað við 32%**. Hetta prógvar, at vøkstur og lækking í útláti kunnu ganga hond í hond við røttu átøkunum og miðvísum arbeiði við burðardygd





# Mál fyri $CO_2$

1. Minka vav 1 og 2 við 50% í 2030 í mun til 2019
2. Minka vav 3 við 60% í 2030 í mun til 2019
3. Økja munandi um endurvinningina av burturkasti í øllum okkara virksemi
4. Allir bilar og bygningar skulu vera elriknir í 2028

# $CO_2$-útlát



Vav 1
Vav 2
Vav 3
100.000
90.000
80.000
70.000
60.000
50.000
40.000
30.000
20.000
10.000
tons av CO2
2019
2020
2021
2022
2023
2024
2025

# Fiskaheilsa og fiskavælferð

Sum alifelag hava vit ábyrgd av at tryggja góða fiskaheilsu og fiskavælferð. Vit ansa væl eftir, at umstøðurnar hjá fiskinum altíð eru so góðar sum møguligt.

Tað hevur stóran týdning, at vatngóðskan er góð, fiskurin hevur nóg mikið av plássi, fóðrið er dygdargott, og at fiskurin verður koppsettur og vardur móti sjúku og skaðum. Fiskurin skal ikki verða strongdur óneyðugt, og vit leggja stóran dent á at handfara laksin sum minst.

Bæði á smoltstøðini og í alingini á sjónum hava vit dugnaligar lívfrøðingar og djóralæknar, sum tryggja, at fiskurin verður ansaður á djóravælferðarligan hátt. Djóralæknarnir gera heilsuætlan fyri øll okkara aliøkir, hava mánaðarligt eftirlit við teimum og skipa fyri, at okkara starvsfólk árliga verða upplærd í at ansa og røkta bæði laks og rognkelsi.

Vit hava ongantíð brúkt hormon til okkara laks og ikki brúkt antibiotika, síðani vit góvust við hesum fyrst í 90'unum.

Góð fiskaheilsa og fiskavælferð gera, at fellið hjá Hiddenfjord er lutfalsliga lítið samanborið við altjóða alivinnuna, har fellið er á leið 15%. Vit arbeiða áhaldandi við at minka um fellið. Í 2023 til 2025 var fellið hjá Hiddenfjord 8,3%*.

*Kelda: Sp/f Avrik


KASK

# Laksurin hevur gott pláss í ringunum

Rakstrarkunngerðin ásetur, at tættleikin í aliringunum ongantíð er meira enn 25 kg/m³. Hetta merkir, at tað altíð er í minsta lagi 97,5% sjógvur og í mesta lagi 2,5% laksur. Tí hevur laksurin í okkara aliringum altíð gott pláss.



## Lívfrøðilig lyklatøl 2023–2025

| Tíð í sjónum (mán./ring) | Lívfrøðiligur fóðurfaktorur | Økonomiskur fóðurfaktorur | Felli | Nýtsla av antibiotika |
|---|---|---|---|---|
| **11,8** | **1,11** | **1,17** | **8,3%** | **0** |



# Lívfrøðiligt margfeldi

Tað hevur stóran týdning, at okkara aling er í samljóði við náttúruna, og at vit ansa eftir, at alingin ikki hevur óneyðuga ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið. Hetta snýr seg um, hvussu vit og okkara veitarar taka ábyrgd av lívfrøðiliga margfeldinum bæði nær og fjar.

## Fóður

Vit brúka fóður, ið hevur lutfalsliga stórt innihald av marinum rávørum. Stóra innihaldið krevur, at vit ansa eftir, at hesar rávørur stava frá ábyrgdarfullum fiskiskapi. Tí er tað gott, at okkara høvuðsfóðurveitari, ið er Skretting, bert nýtir rávørur, ið stava frá sertifis-eraðum fiskiskapi. Í 2024 vóru 98,7% av fiskamjøli og lýsi sertifiserað; 1,3% kom frá lógligari hjáveiðu og avskurðum av fiski til matna.

Vit eru errin av okkara limaskapi í NAPA (North Atlantic Pelagic Advocacy Group), ið arbeiðir fyri burðardyggari umsiting av uppisjóvarfiskastovnum í Norðuratlantshavi. Les meira á napafisheries.org.

NORTH ATLANTIC PELAGIC ADVOCACY GROUP

Ein onnur rávøra í fóðrinum er soya, sum ofta hevur verið sett í samband við skógaroyðing. Skretting nýtir bert soya, ið er sertifiserað og sostatt ikki elvir til skógaroyðing.

## Vatn

Hjá Hiddenfjord er tað serliga smoltstøðin, ið hevur tørv á nógvum vatni. Smoltstøðin er staðsett strateg-iskt, soleiðis at góð atgongd er til bæði áarvatn og kelduvatn. Vit hava avtalu um nýtslu av hesum vatni við viðkomandi jarðareigarar.

Seinastu 15 árini hevur okkara smoltstøð í størri og størri mun brúkt RAS-skipanir, har á leið 97% av vatn-inum verður endurnýtt. Síðani 2025 brúka allar hallirnar á smoltstøðini RAS-skipan.

Í alingini á sjónum og á kryvjivirkinum kemur vatnið frá kommunalari vatnveiting.



## Botnur

Síðani 1998 hevur umhvørvismyndugleikin kravt reglulig-ar botnkanningar fyri øll okkara aliøkir, tá ið lívfrøðiliga tilfeingið er størst. Óheft kanningarstova ger hesar kanningar, og úrslitini vísa, at ávirkanin á botnin und-ir ringunum er avmarkað. Eisini vísa kanningarnar, at ávirkanin oftast er mestsum horvin, áðrenn fiskur verður settur út aftur. Sostatt er talan um lítla ávirkan, sum er avmarkað til tíðina við mest av fiski, og sum við tíðini minkar aftur.

Skipanin við eftiransing er góð, og hon stimbrar okk-um til at gera neyðug átøk fyri at tryggja, at vit ikki hava varandi ávirkan á nærumhvørvið. Vit eru nøgd við okkara avrik og halda okkum undir teimum mørkum, sum Umhvørvisstovan og vit sjálvi seta okkum.

## Djóralív runt um okkara virksemi

Tað liggur serliga stór ábyrgd á okkum at leggja soleiðis til rættis, at okkara virksemi ikki ávirkar djóralívið á firðunum óneyðugt. Nógv djórasløg eru at síggja kring alivirksemið, eitt nú fuglur, kópur og ymisk fiskasløg. Tí luttaka vit í granskingarverkætlanum, ið hava til enda-máls at útvega vitan um, hvussu okkara virksemi ávirkar djóralívið.

Síðani 2019 hava vit saman við føroysku alivinnuni og FIRUM verið við í eini granskingarverkætlan, ið skal lýsa, hvørja ávirkan føroyska alivinnan hevur á føroysk sjósíl.

Vit eru fegin um, at ein granskingarætlan nú er sett í verk, ið skal kanna, um føroysk aling hevur ávirkan á upsa.

Eisini luttaka vit í granskingarverkætlanum av fuglalívi við okkara alibrúk, soleiðis at vit saman við serkønum kunnu gera munagóð átøk fyri at verja fuglalívið rundan um okkara alivirksemi.

Vit virðismeta gransking og luttaka fegin í viðkomandi granskingarverkætlanum um ávirkan frá aling á djóralívið í nærumhvørvinum, og vit halda, at tað er kærkomið við slíkari gransking.

## Nýtsla av evnavørum

At nýta evnavørur er okkara seinasti útvegur í stríðnum ímóti laksalúsini, eftir at ein rúgva av fyribyrgjandi átøkum er roynd, so sum størri smolt, skjótari vøkstur, aling á ábærum økjum, rognkelsir o.s.fr.

Viðhvørt, tá ið fyribyrgjandi tiltøkini móti lús ikki eru nóg mikið, er neyðugt at viðgera laksin fyri lús. Hetta verður annaðhvørt gjørt við fóðurviðgerð ella sum baðviðgerð. Hesi evni eru góðkend av myndugleikunum og verða bert givin eftir ávísing frá góðkendum fiskaheilsuserfrøðingum.




Okkara virksemi skal vera
**í samljóði við náttúruna**
og hava so lítla ávirkan á
umhvørvið sum gjørligt

Hiddenfjord

Hiddenfjord

Í samljóði við náttúruna